**Semja millum**
**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**
**og**
**Føroya Arbeiðarafelag um dagrøktarar**

**Tíðarskeið og lønarkarmur**
Sáttmálin er endurnýggjaður fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober 2015 til 1. oktober 2017.

Semjan byggir á ein karm, sum er 2,25% fyrra árið og 1,9% seinna árið.

- Tann 1. oktober 2015 hækka lønirnar 2,25%.
- Tann 1. oktober 2016 hækka lønirnar 1,9%.

**Broytingar í sáttmálanum**
*Strika ásetingina um lønarhækkanir í grein 5 um løn:*
Tann 01.10 2013 hækkar lønin 190 kr. + 0,9%
Tann 01.10 2014 hækkar lønin 1,9%

*Grein 14 um uppsøgn verður soljóðandi:*
Dagrøktarar, sum eru settir í starv eftir hesum sáttmála, og sum í meðal hava meira enn 15 tíma arbeiðsviku, er uppsagnarfreistin - tá ikki onnur semja er - frá arbeiðsgevarans síðu henda:
1 mánaða uppsagnarfreist frá einum 1. í mánaðinum at rokna, tá viðkomandi hevur verið í starvi í 6 mánaðir.
3 mánaða uppsagnarfreist frá einum 1. í mánaðinum at rokna, tá viðkomandi hevur verið í starvi í meira enn 6 mánaðir.
Uppsagnarfreistin verður hækkað við einum mánaði fyri hvørji 3 ár, viðkomandi hevur verið í starvi, tó hægst 6 mánaðir.
Uppsagnartíðin hjá starvsfólki, sum eru vald til álitisfólk, verður longd soleiðis, at 3 mánaðir verða lagdir afturat uppsagnartíðini, sum hvørt einstakt álitisfólk hevur innvunnið.
Tá dagrøktari sigur upp, er uppsagnarfreistin - um annað ikki er avtalað - 1 mánaður frá einum 1. í mánaðinum at rokna.
Uppsøgn eftir hesum reglum skal vera skrivlig og latin inn ikki seinni enn hin síðsta í mánaðinum frammanundan uppsagnartíðini.
*Ætlar setanarmyndugleikin at siga dagrøktara úr starvi, skal ætlanarskriv um uppsøgn verða latið felagnum og dagrøktaranum til ummælis við minst 14 daga freist. Inniheldur ætlanarskrivið eymar upplýsingar sambært § 27 í fyrisitingarlógini, verður ein fráboðan send Føroya Arbeiðarafelag um, at eitt ætlanarskriv av hesum slag verður sent dagrøktaranum, samstundis sum tað verður sent dagrøktaranum.*
Verður starvsfólk sagt at fara úr starvi, og er orsøkin eftir felagsins metan ógrundað, tá eiga Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Arbeiðarafelag at taka málið til samráðingar og avgerðar millum sín.
Tá fólk fer úr starvi, fær tað frá viðkomandi kommunu váttan um lønar- og tænastualdur við fráfaring (Lønar og tænastualdurkort).

*Dagføring av grein 16 um sáttmálaskeið:*
Hesin sáttmáli fær gildi 01.10.2015, og kann sigast upp við 3 mánaðar freist til ein 1. oktober, tó í fyrsta lagi til 01.10.2017.

Tórshavn tann 21. oktober 2016

**Føroya Arbeiðarafelag**

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**